Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Rætturin til eftirnavn

Spurningar:

1. Hví metir landsstýrismaðurin, at børn hjá samkyndum foreldrum ikki kunnu skrásetast við eftirnavninum hjá sammóður?
2. Eru serligar orsakir til, at landsstýrismaðurin ikki vil fylgja tulkingini hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, sum hevur tulkingarmyndugleika?
3. Fer landsstýrismaðurin at geva fólkakirkjuni boð um, at børn hjá samkyndum foreldrum kunnu skrásetast við eftirnavninum hjá sammóður?

Viðmerkingar:
Í Degi og Viku mánakvøldið 22. august 2022 kom fram, at ymisk boð koma úr landsstýrinum um eftirnavnið hjá børnum, sum hava sammóður.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur ikki, at neyðugt er at broyta lógina, men tað heldur Uttanríkis- og mentamálaráðið.

Hugtakið sammóðir er javnsett við faðir og móður við atliti at foreldrastøðu í familjurættarligu lóggávuni. Tað merkir, at sammøður á allan hátt, sum er viðkomandi í mun til endamálið við navnalógini, kunnu javnsetast við møður og fedrar. Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur tulkingarmyndugleika.

Tí kann spurnartekin setast við, um landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum umsitur í samsvari við lóggávu, sum Løgtingið hevur samtykt.

Bispur hevur sagt í Degi og Viku, at ósemjan í landsstýrinum er ein syndarlig støða fyri møður og sammøður.

Á Løgtingi, 24. august 2022

Ingilín D. Strøm